StÍF-VÍF 25-24(11-13)

# Kærkomin sigur til strandakvinnur

**Kvinnurnar hjá StÍF tryggjaðu sær leygardagin tvey kærkomin stig, tá ið tær í einum tøttum og spennandi dysti vunnu við einum máli á VÍF**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Við átta málum var Fríða Marjunardóttir toppskjútti hjá VÍF, sum tó noyddist at lúta fyri StÍF á Skála leygardagin.*
*savnsmynd*

Strandakvinnur gjørdu leygardagin eitt lítið lop upp eftir stigatalvuni í Sunset-kappingini, efter at tað eydnaðist teimum at fáa tvinni stig til høldar, tá ið VÍF var og vitjaði á Skála.

### Fimm avgerandi minutter

Tað var væntandi, at dysturin fór at gerast rættuliga javnur, men tey flestu høvdu óivað væntað, at VÍF fór at draga longra stráið, og soleiðis sá tað eisini út í løtum av dystinum. Í fyrra hálvleiki gekk annals sera javnt á, og ongantíð vóru tað meiri enn tvey mál á muni millum liðini, og tað var ikki fyrr enn beint fyri hálvleik, at vestmannakvinnur fingu lagt seg fram um við tveimum málum í seinasta minuttinum.

Eftir steðgin gekk framvegis rættuliga javnt á, men VÍF hevði munin fyrstu løtuna, og tað sá út til at gerast trupult hjá heimaliðnum at fáa fatur á gestunum aftur. Men um miðjan seinna hálvleik kom stígur í hjá VÍF, samstundis sum tað av álvara kom ferð á álopsspælið hjá strandakvinnum. Frá at verða aftan fyri við einum máli 19-20, tá ið seinni hálvleikur var hálvrunnin, vendi StÍF fullkomiliga dystinum, tí einans fimm minnutir seinni høvdu tær lagt seg á odda 24-20 við fimm málum á rað.

Henda kollvelting tók fullkomiliga gassið av ballónini hjá VÍF, og at vinna fýra mál aftur seinastu tíggju minuttirnar av dystinum, gjørdist ein ov møtumikil uppgáva fyri gestirnar úr Vestmanna, hóast tær gjørdu eina góða roynd. Hóast VÍF í allarseinastu løtu av dystinum fekk minkað niður í 24-25, so fingr tær ongantíð skapt spenning aftur í dystin. Harvið tryggjaði StÍF sær tvey kærkomin stig, og fingu lagt seg nakað fram um Kyndil, ið er næstaftast á stigatalvuni í Sunset-kappingini.

## FAKTA

**StÍF-VÍF 25-24(11-13)**
**StÍF:** Súnfríð Jacobsen 11(6), Rebekka Justinussen 5, Poula Olsen 4, Paula Høgnesen 3, Rósa Johansen 1, Anna Danielsen 1
**VÍF:** Ioana Rapa 8, Fríða Marjunardóttir 8(4), Alis Høghamar 2, Linda Johannesen 2, Eyðrit Andreasen 2, Finngerð Jensen 1, Sára Jógvansdóttir.
**Brotskøst:** StÍF 6(6), VÍF 5(4)
**Útvísingar:** StÍF 1, VÍF 1
**Dómarar:** Brandur Johansen og Heri Petersen

Søljan-Neistin 18-24(9-9)

# Neistin vann bronsudystin

**Eftir at tað hevði staðið á jøvnum í hálvleikinum, setti Neistin ferð á í seinna hálvleiki, tá ið tær leygardagin vitjaðu Søljuna á Gijlanesi**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Mest áhugaverdi dysturin í Sunset-kappingini farna vikuskiftið mundi óivað verða tann á Giljanesi leygardagin, har Søljan fekk vitjan av Neistanum. Hesi bæði liðini síggja út til at verða tey bæði, sum í longdini fara at stríðast um bronsumerkini, uttan at tey tó fáa gjørt nakað við hvørki Stjørnuna og VB.

### Avgjørt eftir steðgin

At talan er um tvey rættuliga jøvn lið, sást eisini á øllum brøgdum í fyrra hálvleiki av dystinum á Giljanesi. Tí tá gekk leikur rættuliga javnt á, hóast Neistin hevði leiðsluna ein stóran part av teimum fyrstu 30 minuttunum. Men seinasta korterið togaði Søljan Neistaleiðsluna inn aftur, millum annað tí at Kristina í málinum hjá vágakvinnum veruliga vísti sínar dygdir, tá ið hon fýra ferðir á rað bjargaði brotskøstum frá havnarliðnum. Hetta gjørdi tað gjørligt hjá heimaliðnum at koma upp á javnt aftur, og tá ið farið var til hálvleiks stóð á jøvnum 9-9.

Í seinna hálvleiki vildu neistakvinnurnar tó prógva, at tær hava munin á Søljuni, og tær settu ferð á spælið hjá sær. Hetta gav eisini úrslit, tí spakuliga fóru gestirnir frá Søljuni, og dysturin bleiv avgjørdur. Longu aftaná fyrstu sjey minuttirnar av seinna hálvleiki hevði Neistin lagt seg fram um við fýra málum, og hóast Søljan royndi at stríðast, so gjørdist einki. Seinastu løtuna av dystinum gav heimaliðið eisini skarvin yvir, og so økti Neistin aftur eitt sindur um leiðsluna hjá sær, so at endaliga úrslitið gjørdist ein tryggur 24-17 sigur til havnarliðið.

## FAKTA

**Søljan-Neistin 18-24(9-9)**
**Søljan:** Nicloeta Radu Hansen 8(4), Lina Andrulyte 4, Herta J. Simonsen 3, Heidi Maria Akselsen 2, Fía Selma Nielsen 1
**Neistin:** Simona Petersen 7, Annika Thomsen 6(1), Lív Sørensen 5, Unn Kragesteen 3, Jórun Ludvig 2, Ása á Neystabø 1
**Brotskøst:** Søljan 5(4), Neistin 5(1)
**Útvísingar:** Søljan 3(3x2), Neistin 4
**Dómarar:** Dánjal og Kári Hansen



*Neistin vann sonevnda bronsudystin, tá ið tær leygardagin vóru vesturi í Vágum og dystaðust við Søljuna á Giljanesi.*
*savnsmynd*